# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Eisini kunnu tit lesa um ítróttin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Kyndil uttan venjara

*Eftir dystin milum bestu kvinnuliðini hjá Neistanum og Kyndli, sum endaði við sigri til Neistan, gjørdi kyndilsvenjarin, Flemming Raben av, at siga venjarasessin frá sær*



*Eftir gullrúsin tey bæði seinastu árini, hevur ikki skorist eins væl hjá kyndilskvinnunum hetta kappingarárið, og nú hevur venjarin tikið avleiðingarnar av hesum*
***Savnsmynd***

JÁKUP MØRK

Avgerðina hevur Flemming tikið sjálvur, og helst hevur hetta verið av teirri orsøk, at úrslitini higartil í ár ikki hava verið eins góð, og tey bæði seinastu kappingarárini, tá Kyndil sum kunnugt vann føroyameistaraheitið.

Jórun Ludvig, liðskipari á kyndilsliðnum, segði í eini viðmerking til ÍtróttarSosialin, at samstarvið millum partarnar ikki riggaði, men hon leggur samstundis dent á, at eingin klandur ella líknandi hevur verið millum venjara og leikarar.

**Óvissa**
Enn er ikki avgjørt, hvussu verður við venjaraspurninginum tað, sum eftir er av kappingarárinum, men kyndilskvinnurnar royna tó sum frægast at fyrireika seg komandi uppgávuna, tá tær sunnudagin skulu taka ímóti Stjørnuni í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini.

Jórun sigur eisini, at tað ikki er serliga sannlíkt, at venjaraspurningurin er loystur til ta tíð, men at tær hóast hetta venja við fullari ferð.

Í løtuni liggja tvífaldu føroyameistararnir saman við Neistanum á einum triðja plássi í landskappingini, fýra stig aftan fyri oddaliðið úr Klaksvík, og tvey stig aftan fyri VÍF.

Seinastu trý árini var Sophus Dahl Christiansen venjari hjá kyndilskvinnunum, og gjørdist tað tá til eitt silvur- og tvey gullmerki í landskappingini.

# Gekk sum væntað

*Mjølnir kappingin um vikuskiftið var sera væleydnað, men fyrireikararnir halda at teir missa meir enn teir vinna við at kappingin liggur so tíðliga í kappingarárinum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fimti lið høvdu sett sær fyri at royna seg, tá Mjølnir kallaði til flogbóltskapping í Klaksvík um vikuskiftið.

Men tíverri fyri fyrireikararnar møttu bert 46 av teimum 50, og tískil máttu kappingarnar í onkrum deildum leggjast umaftur.

Tað er ikki óvanligt, at onkur lið ikki møta tá kappingin byrjar, men tað er sera óheppið tá talan er um lið í meistaradeildini.

Meistaradeildarliðið hjá ÍF í mansdeildini møtti ikki, og tískil vóru bara fimm lið í tí kappingini.

Sama var í fyrstu deild hjá monnum, har ÍF eisini helt seg vekk, og tað er ikki fuglfirðingum ella ÍF til nakran sóma, at bera seg soleiðis at móti fyrireikarunum. Kvinnurnar hjá ÍF møttu harafturímóti og vunnu enntá kappingina í 2. deild.

**Mjølnir og Fleyr**
Kappingin var soleiðis háttað, at innleiðandi umførini vórðu spæld leygardagin og finalurnar sunnudagin.

Í meistaradeildini hjá kvinnum var finalan millum Mjølnir og Drátt, og henda dystin vann Mjølnir sannførandi.

Í meistaradeildini hjá monnum vann Fleyr á Mjølni í einum dysti, sum til endans var rættuliga spennandi.

Kappingina í 1. deild hjá kvinnum vann Fossanes, meðan Fleyr vann kappingina í fyrstu deild hjá monnum.

Kappingna í aðru deild hjá kvinnum vann ÍF, sum longu nevnt, meðan heimaliðið Mjølnir vann kappingina í aðru deild hjá monnum.

**Liggur ov tíðliga**
Sum heild eru fyrireikararnir sera væl nøgdir við kappingina, sum gekk væl.

Kortini eru teir eitt sindur vónbrotnir av, at hon liggur so tíðliga á árinum, tí tað merkir, at færri luttakandi lið.

– Í ár vóru 20 lið færri, enn tað vóru í fjør, og tað er ikki nógv skeivt, at tað eru júst tey 20 liðini, sum góvu okkum avlopið í fjør, siga fyrireikararnir, sum tí halda, at Flogbóltssambandið eigur at flyta kappingarnar aftur har tær lógu fyrr.

Um tað verður so, mugu vit bíða við at síggja.

Myndir av vinnandi liðunum síggjast á s. 23.

# Hálvfinalurnar byrja í kvøld

*Hondbóltssambandið hevur nú boðað frá, hvussu leikast skal í hálvfinalunum í steypakappingini, og eru nakrir dystir í landskappingini fluttir í hesum sambandi.*

JÁKUP MØRK

Í steypakappingini hjá monnum og kvinnum er nú somikið langt útliðið, at farast skal undir at leika hálvfinalurnar. Fyrstu dystirnir hesum viðvíkjandi verða leiktir í kvøld, tá fyrru hálvfinalurnar hjá monnunum verða leiktar.

Inni á Skála skulu føroyameistararnir úr StÍF spæla ímóti Neistanum, meðan VÍF og Kyndil skulu dystast í Vestmanna. Dystirnir eru settir at byrjað ávíkavist kl. 19.00 og 19.45.

**Jøvn lið**
Sum kunnugt er talan um tey fýra ovastu liðini í landskappingini, og hóast avrik teirra hava verið nakað misjøvn higartil í vetur, so kann roknast við tveimum sera spennandi dystum.

Seinast Neistin vitjaði inni á Skála, var um reppið at teir fingu øll stigini heim aftur við sær, men at enda máttu teir taka til takkar við einum javnleiki.

Hjá StÍF má tað metast sera ivasamt, um leikandi venjarin, Jónleif Sólsker, verður á vøllinum. Hann hevur seinastu vikuna drigist við skaða í knænum, og ikki er vist, nær hesin er lektur.

Dysturin í Vestmanna er ein søga fyri seg, tí hetta er ju stóri klassikarin í føroyskum hondbólti. Higartil hevur tað ligið betri fyri hjá vestmenningum í hesum kappingarárinum, men tá liðini seinasta hittust, varð javnleikur endaliga úrslitið, hóast Kyndil hevði leiðsluna megin-partin av dystinum.

Dysturin millum liðini í Vestmanna endaði við tvey mála sigri til VÍF, so her er somuleiðis líkt til, at talan verður um eina spennandi uppgerð.

Seinnu hálvfinalurnar hjá monnunum verða leiktar ávíkavist 26. og 27. januar.

**Neistin og Stjørnan?**
Hjá kvinnunum verða fyrru hálvfinalurnar leiktar 15. Januar, tá Neistin tekur móti VB, og 16. Januar, tá Stjørnan kemur til Havnar at leika móti Kyndli.

Talan kann í báðum førum gerast um nakrar tættar dystir, hóast Neistin og Stjørnan mugu metast at vera favorittar til at røkka finaluni.

Seinastu dystirnar hevur Neistaliðið fingið heilt góð úrslit, og higartil í árinum hevur Stjørnan verið besta kvinnulið í landinum, og hava tær m.a. vunnið báðar dystirnar móti Kyndli í grundspælinum.

Harumframt kann tað gerast ein dyggur smeitur hjá Kyndli, at tær helst mugu klára seg uttan nakran venjara í fyrra dystinum.

Seinnu hálvfinalurnar hjá kvinnunum verða leiktar 30. januar.

**Fluttir dystir**
Í sambandi við hálvfinalurnar hevur verið neyðugt at broytt kappingarskipanina nakað, og hevur HSF tískil boðað frá, at fylgjandi dystir hjá kvinnunum eru fluttir.

Toppdysturin í landskappingini millum Stjørnuna og VÍF, sum skuldi verða leiktur 16. januar, er nú fluttur til 27. januar.

Dysturin, Stjørnan-Neistin, er fluttur frá 29. januar til 20. februar.

Dysturin, Stjørnan-VÍF, er fluttur frá 30. januar til 11. mars.





*Mjølnir vann kappingina í meistaradeildini hjá kvinnum. Tær vunnu finaludystin móti Drátti*



*Meistaradeildina hjá monnum vann Fleyr. Í finaluni vunnu teir á Mjølnir í einum sera spennandi dysti*



*Kappingina í fyrstu deild hjá kvinnum vann Fossanes...*



*Meðan Fleyr tók sær av fyrstu deild hjá monnum*



*Aðru deild hjá kvinnum vann ÍF*



*Kappingina í aðru deild hjá monnum vann Mjølnir*

*Myndir: Símun á Høvdanum*